Góða Svanna, góði Óli og góðu tit øll.

Trúfesti og virðing fyri fakøkjum er ikki nakað, sum merkir okkara tíð. Í einum nútíðaranda kann eitt arbeiðslív vera merkt av støðugum umskifti og manglandi bindindi. Tilveran er alsamt meira vorðin ein meldur, har hjólini mala skjótari, meðan menniskjað loypur av einari túgvu á aðra. Alt skal gerast upp í tølum, og eru tey í lagi er næstan líka mikið, hvat liggur aftanfyri tølini.

Í slíkum tíðum er gott at uppliva, at tað ikki eru øll, ið lata seg taka av fótum av okkara grunnskygda tíðaranda, har alt snýr seg um støðugt at velja nakað nýtt, og tí ofta lata vísdómin fara. Tí í dag kunnu vit hátíðarhalda ikki minni enn tvey jubileum á sama arbeiðsplássi. Eitt 50 ára jubileum og eitt 40 ára jubileum innan sama fakøki. Ja, tað kann av sonnum sigast, at matrikulin verður settur í hásætið í dag.

Tit bæði, Svanna Justinussen og Óli Johannesen, hava víst eitt stórt trúfesti mótvegis tykkara faki, har tit hava gjørt jarðarviðurskifti og matrikulera umsiting til tykkara lívsstarv. At sýna slíkt trúfesti ímóti fakinum, og at bera slíka vitan sum tit gera, eru menniskjaligir eginleikar, sum geva tykkum stóra virðing millum fólk. Og hesa virðing hava tit bæði eisini fult uppiborið

Tá ið man hevur starvast so mong ár á sama arbeiðsplássi, man óivað liggja til grund ein gleði fyri fakinum samstundis sum arbeiðsplássi samanumtikið má hava verið gott.   Drúgv starvstíð byggir upp nógvar og góðar  førleikar, sum tit nú kunnu leggja eftir tykkum, okkum  øllum til góðar.

At  hava fólk, sum arbeiða so trúføst á einum arbeiðsplássi gevur eisini bæði arbeiðsplássinum og starvsfeløgum tryggleika og stabilitet.  Hetta eru alneyðugir lutir skal  ein menning fara fram og skulu vit sum samfelag megnað at loysa tær uppgávur, sum eru fyri framman.  Vit vóna fyri tykkum bæði, at tit nú taka tykkum tíð at njóta tykkara otium væl vitandi at tit hava røkt tykkara lut til fulnar.

Nú kenni eg tykkum ikki persónliga, men eg havi verið á vitjan á stovninum og má siga at so skjótt man kemur inn um dyrnar, so merkir man eina positiva atmosferu.

Tað er mær fortalt, at tá Óli tekur orðið og hevur nakað at siga um jørð og jarðarviðurskifti, tá tiga hansara starvsfelagar og lurta eftir honum. Hansara vitan og kunnleiki ígjøgnum 50 ára skeiðið í matrikulsins tænastu kann ikki undirmetast, og vónandi fer hann eisini at leggja nakað skrivligt eftir seg til eftirkomararnar í fakinum.

Óli hevur eisini verið álitisfólk vegna starvsmannafelagið. Har stóð hann sum kletturin tá harðast hevur leikað á, og tað eina árið bleiv hann eisini kosin ársins álitisfólk av starvsmannafelagnum. Ikki hissini heiður, sum var fult uppiborin.

Somuleiðis er mær fortalt, at Svanna ígjøgnum hennara 40 ára starvstíð, hevur verið seinasti skansin á matriklinum. Hennara lutur hevur verið at góðskutryggja øll mál, sum eru farin út av húsinum. Hetta hevur hon megnað so væl, at tað næstan ikki er komið fyri at feilir hava verið gjørdir í matrikulerum málum. Eftir at Umhvørvisstovan varð skipað, hevur Svanna partvíst starvast á landsfólkayvirlitinum. Tað starvið hevur hon røkt á sama álitisvekjandi hátt sum uppgávur hennara á matriklinum.

Tað fækkast við so  trúføstum starvsfólkum. Tí fer at vera longri millum hátíðarhald sum hesi. Tí er ikki óhugsandi, at tað á nógvum arbeiðsplássum framyvir fer at vera truplari at loysa nakrar av teimum uppgávum, sum skulu til.

Góðu tit bæði. Tit hava uppiborið bæði virðing og viðurkenning fyri alla ta orku, tit hava lagt í tykkara lívsstarv, ígjøgnum øll hesi 40 og 50 árini.

Hjartaliga til lukku við starvsdøgunum, Svanna og Óli og blíðan byr, og takk fyri alt tað góða tit hava lagt eftir tykkum. Vit vóna, at tað í framtíðini ferð at eydnast at seta góð fólk við í hesi týdningarmiklu størv. Fyrimyndirnar hava tey.

Tað verður sum Heðin Brú hevur sagt tað “gott er at kenna hitan av hondum, ið sleptu”